## Demokratia heldur fram



Á tingfundinum 20. nov. samtykti løgtingið uppskot frá Tjóðveldinum um at Demokratia skal halda fram við virksemi sínum, eisini í 2008. Hetta var samtykt við stórum meiriluta og vóru tingfólk á einum máli um at arbeiði nevndin hevði gjørt, var eitt arbeiði sum øll høvdu fult álit á, og at hetta arbeiði var hegnisliga greitt úr hondum. Løgtingið ynskir at landsstýrismaðurin í javnstøðumálum skal biðja fíggjarnevndina eisini at taka játtan til Demokratiu við í fíggjarlógaruppskotið fyri 2008. Í viðmerkingunum til uppskotið verður mælt til at avsettar vera 500.000 kr. til arbeiðið í komandi árið.

## Ungdómssjóleikarskeið í Nólsoy

Í januar skipa Ung í MáF fyri skeiði í kropsrørslu á palli við Jamie Boylan, dansara úr Manchester. Talan er um eina workshop, sum fer at snúgva seg um hvørji rørslueyðkenni vit seta í samband við tey ávísu djórini, og hvussu hesar rørslur kunnu verða grundarlagið hjá einum sjónleikara at skapa kropslig persónseyðkenni í onkrum leikluti. Jamie dansaði í operuni "Í Óðamansgarði" í 2006, og í 2007 undirvísti hann í dansi á "Ungum í Føroyum" og helt tá eisini eitt lítið skeið fyri Ung í MáF. Skeiðið verður í døgunum 18. – 20. januar og er ætlað øllum sjónleikaráhugaðum millum 14 og 30 ár. Meira fæst at vita um skeiðið á heimasíðuni hjá MáF.

# Síggja veruleika í eyguni



*Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag*

**Tað nyttar einki at koma við burturforkláringum. Vit eru ikki betri, enn kanningin vísir, og tað mugu vit bara góðtaka, sigur Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag**

PISAKANNING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Úrslitið av nógv umrøddu PISA-kanningini kom ikki óvart á Magnus Tausen, formann í Føroya Lærarafelag. Hetta var nakað, hann hevði væntað.

- Ja, tað hevði eg væntað. Eg hevði roknað við at úrslitið gjørdist stórt sæð tað sama, kanska eitt lítið sindur frægari, og tað vísir seg eisini at vera har á leið, sigur Magnus Tausen.

Men hvussu ber tað so til, at formaðurin í Lærarafelagnum hevði roknað við hesum?

- Eg helt alla tíðina, at kanningin seinast var rættiliga eftirfarandi, og hendan kanningin er gjørd, áðrenn hitt fyrra úrslitið kom fram, so vit hava ikki havt møguleikar at rætta upp á nakað sum helst, vísir Magnus Tausen á.

Hann heldur, at næmingarnir er líka skelkaðir sum øll onnur, og tað metir hann vera ein bati í sjálvum sær, tí næmingarnir nú hava funnið út av, hvussu nógv verður gjørt burturúr.

Men samstundis heldur Magnus Tausen, at vit eru ikki betri enn kanningin vísir, og tað mugu vit bara síggja í eyguni.

- Vit kunnu sjálvandi koma við øllum møguligum sjófrágreiðingum og burturforkláringum, men tað verður bara til tað: Burturforkláringar. Nú er bara hjá okkum øllum, sum varða av skúlanum, at siga, at hetta er støðan. Møguliga verður úrslitið næstu ferð eitt sindur betri, tí nú vita vit, hvat tað snýr seg um, og tí taka vit tað kanska meiri álvarsamt, men vit toga okkum ikki upp har, sum vit fegin vilja verða, sigur Magnus Tausen.

### Darla aftaná

Spurdur, um føroysku lærararnir ikki eru nóg góðir, sigur Magnus Tausen, at tað haltar álvarsliga við eftirútbúgvingini.

- Sjálvur tók eg læraraútbúgving fyri tíggju árum síðani, og skúlin er broyttur ótrúliga nógv bara hesi árini, eg havi verið lærari. Eg havi ikki fingið nøktandi eftirútbúgving, so tú kanst bara ímynda tær tey, sum hava verið lærarar í 30-40 ár, sigur Magnus Tausen.

Hann heldur tað beinleiðis átti at verið eitt krav, at lærarar verða eftirútbúnir regluliga. Tað átti at verið eitt krav fyri at kunna vera ein dugnaligur lærari. Og øll vita, at tað haltar á hesum økinum, lærarar eru ikki á hædd við restina av samfelagnum, kanska serliga á KT-økinum.

- Her eru vit langt aftanfyri. Tí vit skulu minnast til, at tað eru ikki bara teldur, tað snýr seg um. Tað eru eisini neyðugu føroysku forritini og ikki minst, at lærararnir hava neyðuga førleikan at nýta teldur og forrit í undirvísingini. Tí er tað nakað, næmingarnir hava áhuga í, so er tað KT, sigur Magnus Tausen.

Hann sigur, at tað altíð er ein spurningur um pengar, men ikki bara tað, tí um vit sammeta okkum við OECD, so kostar hvør føroyskur næmingur minst tað, sum ein næmingur í OECD kostar í meðal.

- Men vit eru soleiðis fyri geografiskt, at tað er neyðugt við smáum skúlum, og tað sigur seg sjálvt, at teir verða dýrari at reka enn um vit høvdu størri eindir. Og tað er ein spurningur, sum vit mugu tora at taka upp til kjak, sigur Magnus Tausen.

### Fokus á tað grundleggjandi

Næmingarnir broyta seg og fylgja við tíðini, ikki minst tá tað snýr seg um KT, har menningin gongur við rúkandi ferð. Landsstýrismaðurin hevur ført fram, at tiltøk eru sett í verk síðan seinast, men er tað nóg mikið, tað er spurningurin.

- Tað er rætt, at vit hava sett nógv tiltøk í verk síðani seinast, men nú snýr tað seg um tað meiri grundleggjandi. Skal skúlin út til kommunurnar ella skal hann ikki. Skulu børn í skúla fyrri ella skulu tey ikki. Skal læraraútbúgvingin á eitt akademiskt stig ella skal hon ikki. Tað er meiri tað, sum tað snýr seg um nú, sigur Magnus Tausen.

Men hvørjar vónir hevur formaðurin í lærarafelagnum so til úrslitið næstu ferð.

- Eg væntið, at úrslitið verður heldur frægari. Nú vita vit, hvat hetta snýr seg um. Næmingarnir hava sjálvir sagt, at um teir høvdu vita, hvussu nógv bleiv gjørt burtur úr, høvdu teir tikið alt í størri álvara, men vit toga okkum ikki tey hundrað stigini upp, sum vit gjarna vilja, sigur Magnus Tausen.

Hann heldur tað verða neyðugt, at land og kommunur nú ganga saman. Tað kann ikki nýtast sum undanførsla, um skúlin er landsella kommunumál og at summir skúlar eru so vánaligir, at verulig undirvísing ikki kann fara fram.

- Førleikin hjá okkum lærarum má setast í miðdepilin. Er tað neyðugt við einari fimm ára master útbúgving fyri at verða lærari yvirhøvur, so sum vit skjóta upp, ja, so er at taka tað stigið og fáa okkum gomlu lærarar inn undir nýggju skipanina. Tað eru tey heilt stóru og grundleggjandi tingini, vit skulu tosa um, og ikki, um tað skal ein tími meiri til her ella har. Tað er grundleggjandi bygnaðurin at skúlanum vit mugu fáa eitt kjak um, segði Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag við Rás2.



*Sum sæst hevur hemarin bitið á í skeivum enda*

# Bitið á skeivan enda

**Tað er ikki heilt óvanligt, at hemari bítir á, men tað er vanliga í tí endanum, har kjafturin er**

HEMARAVEIÐA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein sjómaður kann koma út fyri so mangt. Og fáir munnu teir sjógarpar vera, sum ikki vita okkurt forkunnugt at siga frá á sjónum.

Herfyri var Agnar Nielsen í Vestmanna úti fyri nøkrum heldur óvanligum, tá hann fiskaði hemara.

Tað var ikki so løgið, at tað beit á hjá honum, men tað púra óvanliga var, at hemarin »beit á« í skeivum enda. Hann hevði nevniliga vavt húk og teym um stertin og var blivin fastur.

Øll, sum hava verið á seiðabergi og pilka, og hava krøkt ein seið nærhendis stertinum, vita, hvussu nógv ein so lítil fiskur setir á. So vit kunnu bara ímynda okkum, hvussu nstríggið tað man vera, at fáa ein 450 punds hemara inn, sum er krøktur á henda hátt.

Tað tók eisini Agnari hálvanannan tíma at fáa fiskin innanborða. Tá hevði hann verið tríggjar ferðir á borði, fyri síðani at renna út við allari 250 metra longu línuni.

Tað var seinasta fríggjadag, at Agnar fekk hendan hemaran, sum vigaði 446 pund og var 240 sentimetrar langur.